# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# 100.000 krónur til kvinnufótbólt



*Kvinnufótbóltur fær nú serstaka játtan á fíggjarlógini*

**Landsstýrið flytur í part av játtanini hjá FSF til ÍSF. Men samstundis verða lætnar 100.000 kr. eyka til kvinnufótbólt**

ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í fíggjarlógaruppskotinum, sum nú verður viðgjørt í tinginum, framgongur millum annað, at Landsstýrið ætlar at stuðla ítrótti í breiðari høpi, enn tað higar til hevur verið gjørt.

Áður hevur tað verið so, at Fótbóltssambandið hevur fingið eina árliga játtan upp á 900.000 kr. Hendan játtanin íkom, tá føroyskur fótbóltur av fyrstan tíð fór upp í altjóða kappingar.

Nú er ætlanin tó, at henda upphæddin skal flytast frá Fótbóltssambandinum til Ítróttarsambandið at umsita. Og í ár verður stuðulin soleiðis býttur í helvt, har ÍSF fær helvtina.

Hinvegin fær fótbólturin eisini nakað aftur. Ein meiriluti – samgonguumboðini – í fíggjarnevndini tekur nevnliga undir við, at játtanin til FSF hækkar 100.000 krónur. Upphæddin er oyramarkað til kvinnufótbólt.

# Ítróttajáttanir hækka

Heðin Mortensen, sum nú er fyrrverandi ítróttarforseti í Føroyum, fanst í seinastu formansfrágreiðing sínari at vantandi politiska viljanum at stuðla ítróttinum fíggjarliga.

Um tað eru hesi orðini, sum hava gjørt mun, ella um onnur viðurskifti gera seg galdandi, skalt vera ósagt, men í fíggjarlógaruppskotinum, sum nú verður viðgjørt, eru fleiri batar í so máta.

Soleiðis verður játtanin til ÍSF økt við 200.000 kr., umframt at felagsskapurin fær 450.000 kr. eyka, ið verða fluttar frá játtanini til Fótbóltssambandið.

ÍSB fær 100.000 kr., nú Føroyar skulu standa fyri norðurlendska sekretariatinum. Og loksins verður eisini 1 millión játtað sum stuðul til ítróttarhøll á Sandi og til nýggju badmintonhøllina í Klaksvík.

**-mørk**

## Dystaryvirlit

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 28.05 | HB-ÍF | Eiler Rasmussen |
| 28.05 | Skála-EB/S | Rúni Gaardbo |
| 28.05 | KÍ-NSÍ | Jan á Líðarenda |
| 28.05 | B71-Víkingur | Dagfinn Olsen |
| 28.05 | B68-B36 | Páll Augustinussen |

# Manchester United ætlar at melda Real Madrid



**Ensku meistarnir eru misnøgdir við framferðarháttin hjá Real Madrid viðv. Christiano Ronaldo**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Í Manchester United eru teir sera harmir um aggresiva framferðarháttin hjá Real Madrid, sum hava meldað út, at United-álopsleikarin, Christiano Ronaldo liggur ovast á ynskilistanum hjá teimum yvir nýggjar leikarar.

Í eini almennari fráboðan sigur Manchester United: - Vit hava einki annað val, enn at melda Real Madrid til FIFA, um teir halda fram við hesum atburðinum. Teirra almennu útmeldingar, sum verða gjørdar fyri at fáa spælaran (Ronaldo) at ivast í framtíð sínari, eru ímóti reglunum, og felagið finnur seg ikki í hesum framferðarháttinum longur. Spælarin hevur ein langtíðar-sáttmála, og spæliloyvi hjá honum er í Manchester United. Spælarin er ikki til sølu!

- Vit vita, at teir ikki eru eitt felag, sum selur. Men alt hetta er ein trupulleiki millum teir og spælaran (Ronaldo), sigur forsetin í Real Madrid, Ramon Calderon.